# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara kæri bróðir

**Goodvin Mellemgaard**

ættaður úr Klaksvík
búsitandi í Hirtshals

andaðist fríggjadagin 8. februar, 70 ára gamal.

*Familjunnar vegna*
**Eli, Yarmouth og Daisy**

Tey, ið ynskja at minnast Goodvin, kunnu lata eina gávu til samkomuna Malta í Hirtshals. Konta í peningastovnunum

## Hannefía Næs 85 ár

Í dag, 11. februar, verður Johanna Sofía – Hannefía – Næs 85 ár. Hannefía er fødd og uppvaksin á Kirkju á Fugloynni, men sum ung kom hon til Havnar at tæna í heiminum hjá Ísaki Næs. Har hitti hon Rikard (1913-1995), og í 1952 giftust tey bæði. Saman fingu tey fimm børn. Katrin, sum býr í Hvannasundi, Jákup, sum býr í Havn, Maritu, sum býr í Nørre Snede í Danmark, Hjørdis, sum býr í Hoyvík og Jógvan, sum býr á Skála.

Ommubørnini eru átta í tali – Tóri, Rógvi, Hallgerð, Torbjørn, Elin, Ragnhild, Guðjón og Jóhan. Og seinnu árini eru fimm langomubørn eisini komin. Tey eru Durita, Marta, Rannvá, Niels Áki og Eyðun.

Hóast Hannefía, sum í dag býr á Tjarnargarði í Havn, longu flutti til Havnar sum blaðung, so hevur alskurin til heimbygdina altíð verið stórur. Og hóast tað við árunum er vorðið longri millum ferðirnar, so roynir hon framvegis at vitja heima í Fugloy.

Dagurin í dag verður hildin saman við familjuni í heiminum hjá Hjørdis í Niðarugøtu 12 í Hovyík.



## Dagurin

**12. februar. Eulalia,** deyð umleið ár 300. Ung genta í Barcelona í Spaniu, sum varð pínd og myrd fyri trúar sakir. Er verndarhalgimenni hjá býnum Barcelona. Navnið er grikst og merkir tann væltalandi.




# Próvtøka á Føroya Læraraskúla



Fríggjadagin 8. februar fekk ein flokkur av námsfrøðingum prógv á Føroya Læraraskúla.

Tey sum fingu prógv vóru, fremsta rað f.v.: Joan Eysturtún Blástein, Vanja Dam, Beinta Karbech Hansen, Jacoba S. Hansen, Marjun Egholm Højgaard, Elin Horn, Annbritt Brynjolvsdóttir Jacobsen, Rannvá Jacobsen, Evy Joensen, Sanna Joensen, Tórunn Joensen og Elsebeth Johannesen.

Miðraðið f.v.: Joan Sandursdóttir Johannesen, Beinta Klakstein, Anni Olsen, Bjørg av Kák Olsen, Marjun Olsen, Ruth Vang Olsen, Guri Poulsen, Elisabeth við Reiðlið, Laila Reynheim, Rói Sigurðsson, Poula Sjóstein og Vígdis K. Skorheim.

Aftasta rað f.v.: Maria Sørensen, Elin N.W. Tausen og Arnbjørg Tórbjarnardóttir

*Mynd: Jens Kristian Vang*